*Chek in skúrurin hjá Norrønu fekk nakað av skaða, tá síðulúkan á bilinum hjá NCC tók í skúrin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





# Borivognur rendi á Chek in skúrin

ÓHAPP
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Seinnapartin hósdagin rendi ein bilur hjá NCC á Chek in skúrin hjá Smyril Line á Eystaru Bryggju í Havn.

Tá bilurin koyrdi fram við skúrinum, varnaðist bilførarin ikki, at ein síðulúka stóð opin. Í tí hann fer fram við skúrinum, rakar lúkan í hornið og brýtur fyri sær, m. a. ein rút í skúrinum.

Av politstøðini í Havn verður sagt, at talan var um eitt hendiligt óhapp. Bilurin var skrásettur í Noreg, og tryggingarviðurskiftini vóru í lagi.

# Ælabogin í Suðuroynni

**Sunnudagin klokkan 15 verður konsert í Porkeri. Har fara musikskúlanæmingar og limir í Ælaboganum at spæla saman**



*Ælabogin vitjar Suðuroynna um vikuskiftið og fer at spæla til konsert saman við musikkskúlanæmingum*

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Klokkan 15 sunnudagin 25. september verður konsert í skúlanum í Porkeri, har Ælabogin og næmingar í musikkskúlanum fara at spæla saman.

Vikuskiftið verður eitt venjingar og hugnavikuskifti, har leikararnir venja og hugna sær. Og limirnir í Ælaboganum skulu sjálvsagt eisini bussferð at síggja Suðuroynna. Tá sunnudagurin kemur, endar vikuskiftistiltakið við almennari konsert í Porkeri.

Tað eru leiðarar fyri Ælabogan og leiðarar fyri Musikkskúlan í Suðuroynni, sum longi hava havt ætlan um slíkt tiltak, har Ælabogin kemur á vitjan, og sunnudagin sleppa áhugaðir lurtarar at hoyra, hvat kann fáast burturúr slíkari felagsvenjing eitt heilt vikuskifti.

# Bummarnir fyri í Vágatunlinum

TUNNILSTRYGD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fríggjamorgunin stóðu langar bíðiraðir við tunnilsmunnarnar báðu megin Vágatunnilin. Orsøkin var, at bummarnir vóru av sær sjálvum farnir fyri.

Á løgreglustovuni í Havn kunnu teir lata bummarnar uppaftur, men tað er ein trygdarskipan, sum ger, at bummarnir fara fyri av sær sjálvum.

Teir høvdu arbeitt í tunlinum um náttina - men tá bummarnir fara fyri, so má løgreglan tryggja sær, at alt er í lagi.

Tí fóru ein løgreglubilur við útrykningi úr Havn at staðfesta, um alt var í lagi. Og alt var í lagi, so eftir ein hálvan tíma ella so, kundi løgreglan lata tunnilin uppaftur.




## Vit søkja forritara

Vegna økt virksemi, bæði í Føroyum og uttanlands, verður søkt eftir royndum forritara til okkara menningardeild.

Arbeiðið á deildini er fjølbroytt og fevnir um allar tættir innan menning og forriting av eginloysnum.

Talan er um eitt starv, har tú fært høvi at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi við dugnaligum og góðum starvsfeløgum.

**Førleiki**
Avgerandi er, at tú hevur hollar royndar innan OOP. Fyrimunur er um tú hevur førleika innan fylgjandi økir:

- Delphi
- C++
- C#
- SQL dátugrunnar
- Microsoft stýriskipanir yvirhøvur

Tú dugir at seta teg inn í nýggj viðurskifti og at loysa uppgávur sjálvstøðugt, men hevur eisini evnir til at gerast ein virkin og góður samstarvsfelagi sum partur í verkætlanum.

**Starvstreytir**
Løn og onnur starvsviðurskifti verða avtalað í tráð við roynd og førleika.

**Umsókn**
Um tú vilt vita meira um starvið ert tú vælkomin at ringja til Edvard S. Remberg á telefon 344075. Skrivlig umsókn við CV, prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til esr@formula.fo ella við brævi til

Formula.fo
Stiðjagøta 5
FO-100 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 7. oktober 2005.

Formula.fo

Formula.fo er Føroya størsta privata KT fyritøka við yvir 60 fólkum í starvi.

Eitt av virkisøkjunum er menning av loysnum bygdar á fyrst og fremst Microsoft tøkni.

www.sansir.fo

P/F Formula.fo, Stiðjagøta 5-11, Postrúm 1078, 110 Tórshavn, Tel 344000, Fax 344001, www.formula.fo

formula.fo



## Tankafelt Terapi

gevur tær innlit • sálarliga vælveru • persónliga menning

Hjálpir og minkar um strongd, angist, svøvntrupulleikar, avhengiheit, lættari tunglyndi, próvtøku- og framløguótta, vreiði, hæddarræðslu, flograðslu, sorg, klaustrofobi, araknofobi, tvangstankar (OCD), sosial- og panikkótta, umsorganarsvík, skelkandi mein (trauma), pínu, staming, orðblind, jetlag, DAMP og tílíkar trupulleikar.

**TFT-Stovan**
**v/ Annu Dalsgaard • Tel 210075**
**& Bryndis á Dunga • Tel 514161**
*sí heimasíðu: www.tankefeltterapi.info*
**Sertifiseraðar TFT-Terapeutar**